UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 1. mai 2018
J.nr.: 18/00134-6
At tilskila í svari
Viðgjørt: OAS
Tygara skriv:

**Kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning til hoyringar**

Hjálagda kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning verður við hesum send tykkum til hoyringar.

Kunngerðin um stuðul til ferðavinnumenning hevur heimild í § 7, stk. 2-4 í lógini um P/F Visit Faroe Islands, og skal skipa tann partin av stuðlinum, ið kann verða latin til vinnuligar verkætlanir innan ferðavinnuna. Endamálið við kunngerðini er at tryggja neyvari reglur og eina gjøgnumskygda skipan fyri tann partin av stuðlinum, ið Visit Faroe Islands ikki stýrir beinleiðis, og sum kann verða latin uttanveltaðum pørtum.

Vísandi til § 6 í kunngerðini, er talan er um eina krónu-fyri-krónu stuðulsskipan. Tað merkir, at umsøkjarin sum meginregla skal tryggja sær í minsta lagi helmingin av fíggingini frá øðrum pørtum. Hesin leistur er valdur fyri at skapa betri sannlíkindi fyri, at tað eru seriøsar verkætlanir, við einum breiðum stuðulsskara, ið verða sjósettar. Harumframt eggjar ein slík skipan til samstarv millum fleiri aktørar og harvið eisini betri grundarlag fyri eini væl eydnaðari verkætlan.

Kunngerðin er send hesum hoyringarpørtum:

Ferðavinnufelagnum
Visit Faroe Islands
Vinnuframa
Kommunufelagnum
Kunningarstovuni í Fuglafirði
Kunningarstovuni í Runavík
Norðoya kunningarstovu
Kunningarstovuni í Nólsoy
Sandoyar kunningarstovu
Kunningarstovuni á Tvøroyri
Visit Vágar
Heilsu- og innlendismálaráðnum
Útoyggjafelagnum

Freistin at senda inn viðmerkingar er 20. mai.

Vinaliga

Oyvindur av Skarði
fulltrúi

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO